


www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 03 - 2012

# Greenpeace vil steðga Shell í Arktis

Nú eitt av heimsins størstu oljufeløgunum, hálendska Shell er við at fyrireika seg til at bora fleiri brunnar í havinum norðan fyri Alaska royna umhvørvisfelagsskapir at vísa sína ónøgd og mótstøðu. Í gjár bundu fólk frá Greenpeace seg føst í tveir ísbrótarar, sum eru í gerð í Finlandi. Tað er finski staturin, sum eigur teir men hevur gjørt avtalu við Shell um langtíðarleigu. Ísbrótararnir skulu brúkast at slóða fyri fyrstu boringunum hjá Shell í Beuforthavinum og Chucksi havinum norðan og vestan fyri Alaska. Greenpeace við vil mótmælum sínum siga umheiminum frá, at tað er alt ov vandamikið at fara undir at bora eftir olju í Arktis. Hendir eitt óhapp kann talan verða um eina stóra náttúruvanlukku. Umboð fyri felagsskapin vísir í tíðindaskrivi á, at Norðurlond sum Danmark, Noreg og Finland hava sum limir í Arktiska Ráðnum eina serstaka ábyrgd fyri at verja alt tað arktiska økið móti dálking frá eitt nú oljuvirksemi og eiga tey tí at forða fyri boringum har. Tey gera beint tvørturímóti. Finski staturin gongur á odda og leigar tveir ísbrótarar til Shell, meðan Danmark og Norra eru í ferð við at býta Arktiska økið sínamillum til egnan fyrimun. Arktiska økið er meira hótt enn nakrantíð fyrr. Norðurlond eiga at kenna sín moralsku ábyrgd heldur enn at byggja hesa á girnd. Norðurlond áttu at verið tey fyrstu at vart Arktis sigur umboð fyri Greenpeace. Herfyri steðgaðu fólk frá Greenpeace boriskipinum Noble Discoverer at koma inn í havn í New Zealandi. Skipið er við at gera klárt til at bora fyri Shell í Arktis.